# Aftursvar til Heðin Mortensen, borgarstjóra

JÓANNES EIDESGAARD
landsstýrismaður



Í samband við sokallaða "Pakkan", sum landsstýrið arbeiðir við, bjóðaði eg báðum kommunufeløgum á fund her í Fíggjarmálaráðnum. Á fundinum luttók borgarstjóran í Havn, sum eisini er formaður fyri KSF og formaðurin fyri Føroya Kommunefelag. Eg gjøgnumgekk tær ætlanir, sum vit arbeiða við og vóru ríkiligir møguleikar at fáa útgreina ávís viðurskifti umframt at gera viðmerkingar – eisini kritiskar. Tað var júst endamálið við fundinum. Fundurin tyktist sera jaligur, og dagarnir eftir hoyrdist einki frá hvørgum av kommunufeløgunum.

Men nú knappliga kemur Heðin Mortensen sum ketta upp úr høvdatrog við sera hvassum atfinningum í bløðunum, í útvarpi og á øllum portalum, tó framvegis uttan at hava sett seg aftur í samband við meg ella Fíggjarmálaráðið. Løgin arbeiðsháttur.

Undir yvirskriftini "Landið tekur til sín frá kommununum" finst Heðin Mortensen harðliga at búskaparligu ætlanum hjá Fíggjarmálaráðnum ella sokallaða `"Pakkanum.."

Fyrst ein lítil rættleiðing. Í grein síni tosar Heðin Mortensen um kreppupakkan hjá landinum. Hetta er misskilt, tí talan er ikki um ein kreppupakka, men um ein pakka við:

* Bygnaðartiltøkum
* Rakstar og rationaliseringstiltøkum
* Virkisskapandi tiltøkum

Í greinini sigur Heðin Mortensen, at landið tekur til sín av tí sindrinum, ið kommunurnar fáa í dag,. Tað er ikki rætt, tá sagt verður, at kommurnar bert fáa eitt sindur. Gongdin seinastu nógvu árini vísir nakað heilt annað. Talvan niðanfyri vísir, hvussu parturin hjá ávikavíst kommunum og landið av skattskyldugu inntøkunum hjá borgarunum hevur býtt seg seinni árini.

Sí talvu 1

Verður hugt eftir roknskapartølunum fyri árini 1997 – 2007 sæst, at landið hevur økt sínar útreiðslur til rakstur og løgur munandi minni enn kommunurnar hava og enntá munandi minni enn vøkstuirn í brouttotjóðarúrtøkuni í sama tíðarskeiði. Talva 2 vísir gongdina.

Sí talvu 2

Onkrar uppgávur eru í hesum tíðarskeiði lagdar út til kommunurnar at umsita. Barnverndin varð løgd út á tann hátt, at landið lækkaði landsskattin eitt prosentstig, móti at kommurnar kundu hækka sítt prosent tilsvarandi. Tá barnaansingin bleiv flutt til kommunurnar, fingu kommunurnar kompenserað væl meir enn barnaansingin tá kostaði. Men kommunurnar hava tó síðan útbygt hesa tænastu munandi.

Tað er tó ein sannroynd, at kommunurnar seinnu mongu árini hava tikið ein størri og størri part av teimum skattakrónum, ið kravdar verða frá borgarunum, men avgerandi er tó ikki, hvat land og kommunur taka frá hvørjum øðrum, men heldur hvat borgarin fær aftur fyri tað, ið land og kommur taka frá honum.

Men mín niðurstøðan er - fyri at brúka orðini hjá Heðini Mortensen - at tað er sera ivasamt, um kommunurnar nú fingu ein lítlan og landið ein stóran. Kanska var tað beint øvugt.

Talva 1

| | 1985 | 2007 |
|---|---|---|
| Kommunurnar partur av skattskyldugu inntøkunum | **12,9%** | **16,4%** |
| Landskassans partur av skattskyldugu inntøkunum | **21,0%** | **16,7%** |

Talva 2

| | |
|---|---|
| Útreiðsluøking hjá kommunum frá 1997-2007 | **238%** |
| Útreiðsluøking hjá landinum frá 1997-2007 | **75%** |
| Vøkstur í BTÚ frá 1997-2007 | **110%** |

# Søgan um frysta blokkin

HANS J. HERMANSEN



Henda søgan, ið sigst føra okkum fram móti einum sjálvberandi búskapi, byrjar í bóklinginum: Frá heimastýri til fullveldi. Hesin bóklingur varð borin hvørjum húski í Føroyum í 2000. Fólkaflokkurin, Tjóðveldisflokkurin og Sjálvstýrisflokkurin sótu tá í samgongu, og tey trý, Anfinnur Kallsberg, Høgni Hoydal og Helena Dam á Neystabø, hava sett síni nøvn á síðu 5 fyri nevndu flokkar.

Á aftastu síðu, seinasta brotið, stendur soleiðis (endurgeving): 'Yvirskotið hjá tí almenna hevur nú í nógv ár verið ógvuliga stórt. Í ár 2000 verður minni enn ein triðingur av tí danska stuðlinum brúktur í samfelagnum. Restin fer til samansparing, sum skal nýtast, um búskapurin verður fyri afturgongd.

Hetta er orsøkin til, at búskaparfrøðingar siga, at løtan er lagalig til at fara undir at byggja upp ein sjálvberandi búskap' (endurgeving liðug).

Í 2001 verður semja gjørd millum Landsstýrið og donsku stjórnina um, at ríkisveitingin í 2002 verður sett til 615,5 milliónir krónur. Hetta er ein niðurskurður frá árinum fyri við 366,4 milliónum í sambandi við, at vit yvirtaka skúlaverkið og almenna forsorg. Samstundis verður blokkurin fastlæstur tey næstu 5 árini, meðan hann varð prístalsviðgjørdur frammanundan.

Mannagongdin, tá ið blokkurin verður fastfrystur, er síðan, at hvørt ár í desembur mánaði undirskrivar okkara fíggjarmálaráðharri eina avtalu, sum sigur, at blokkurin skal ikki dýrtíðarviðgerast, við øðrum orðum: Hann skal lækkast við dýrtíðarviðbótini. Eins, zwei, drei, keine Hexerei, nur Behändigkeit.

Í Sosialinum 30. juni í ár sigur Jóannes Eidesgaard, landsstýrismaður í fíggjarmálum, at tað 'er at bíta høvdið av allari skomm' (um vit fara at biðja um at 'hækka' blokkin, hjh).

Hvør eigur skommina, um nøkur skomm er? Er tað ikki tit, ið manna løgting og landsstýri? Tit settu sjálvstýraran til fyri 9 árum síðan, og tit vilja ikki broyta kós, tí tað er skomm! Ella duga tit ikki? Ella fáa tit tykkum ikki til tað? Tí tað er skomm?

Í skjótt 9 ár hava vit siglt fram móti einum sjálvberandi búskapi, vit sigla enn við fullari ferð, og kósin er hin sama. Og tað er skomm at broyta kós?

Ein stórur partur av Føroya fólki biðjur ikki um at hækka blokkin, vit biðja bara um, at tit, ið manna løgting og landsstýri, ikki lækka hann aftur í ár. Um hann ikki varð lækkaður øll hesi árini, hevði nógvur peningur staðið í grunni til verri tíðir, sambært bóklinginum nevndur omanfyri.

Ríkisveitingin hevði í ár verið 1,4 milliard, einans 0,1 % - ein promilla – av donsku fíggjarlógini, sambært Høgna Hoydal á heimasíðu Tjóðveldis 04.12.2008.

So, fíggjarmálaráðharri, er munur á skommini, um vit taka tað, vit hava rætt til ella bara ein part av tí? Um tað er skomm at taka móti øllum blokkinum, er tað so ikki eisini skomm at taka móti parti av honum? Tí eiga vit antin at taka móti øllum blokkinum ella ongum, ikki einum tílíkum heimasmíðaðum kripli, sum hann er gjørdur til. Og tað er eingin orsøk til at fara at samráðast um at skerja hann eina ferð afturat, sum fíggjarstøðan er í løtuni.

Vísar kvinnur og vísir menn hava sagt mangt gott gjøgnum tíðirnar. Vit áttu at lurtað oftari eftir teimum og
latið vit og skil rátt. M.a. verður sagt, at "tann, ið sigrar á sær sjálvum, vinnur største sigurin" (Kung-Fu-Tse, Buddha og onnur). Vit kenna eisini søguna um tær sjey feitu kýrnar, men tað er eftir øllum at døma ikki góður politikkur í dag.

Lat tað at enda vera sagt, at blokkurin bjargar okkum neyvan. Vit noyðast at finna nýggjar inntøkukeldur og skapa nýggjar vinnumøguleikar, um vit skulu fáa ein sjálvberandi búskap, men eg ivist í, um hann verður sjálvberandi einans við at skerja inntøkur landsins. Men álitið og trúvirðið á okkara fólkavaldu eru illa trevsað av tílíkum politiskum avgerðum.

Áhugavert hevði verið at frætt, hvat búskaparfrøðingarnir siga um støðuna nú?

E.S.: Hans Pauli, taki hattin av fyri tær, bæði tað tú hevur framt sum landsstýrismaður og fyri avgerðina um at fara frá.

# Javning ein sjálvfylgja

JÓGVAN SKORHEIM
virkandi borgarstjóri í Klaksvíkar Kommunu



**Borgarstjórin í Havn hevur víst á, at skattgjaldararnir í Suðurstreymoy koma at gjalda skatt fyri allar Føroyar, um ein javning millum kommunur verður sett í gildi. Við fyrsta eygnabrá kann hetta tykjast rætt, men sannleikin er, at allir býir og bygdir uttan um Suðurstreymoy í longri tíð hava verið við til at gjalda skatt til marglæti hjá Tórshavnar Kommunu.**

Javning millum kommunur hevur verið nógv umrødd hesa seinastu tíðina, og tó at nógv er komið fram, meti eg ikki, at málið er nóg væl og rætt lýst.

Ein slagsíða av høvuðsstaðar argumentum hevur givið fleiri borgarum í Føroyum ta fatan, at útjavningin er órættvís.

Hetta er langt úti, og kann eg ikki, sum virkandi borgarstjóri í Klaksvíkar Kommunu, lata hetta týdningarmikla mál fara ósvarað aftur við borðinum.

**Framleiðslan úti um landið**

Í meiri enn 100 ár hevur fiskivinnan verið ein berandi partur av tí føroyska vinnuvegnum.

Hetta er, sum flest øllum kunnugt, nógv tann størsta útflutningsvinnan í Føroyum.

Klaksvík er fiskivinnuhøvuðsstaður føroyinga, og økini uttan fyri Havnina hava staðið á odda fyri so at siga allari framleiðslu upp gjøgnum árini.

Skulu vit reksa fleiri av teimum virkjum, sum hava verið við í hesari framleiðslu, kunnu vit nevna Kósin, Bakkafrost, Havsbrún, Vaðhorn, Alilaks, Fiskavirkið í Fuglafirði, Kovin, Tavan, Norðís, Norðfrá og fleiri afturat.

Øll hendan framleiðslan hevur verið við til at hildi føroyska samfelagnum uppi, og ikki minst Tórshavnar Kommunu.

**Havnin fær inntøkurnar**

Allir fiskurin, sum hevur verið og dagliga verður virkaður kring landið, er í seinastuni alt meira blivin útfluttur umvegis bryggjukantin í høvuðsstaðarkommununi.

Harvið er tað bara ein kommuna, sum fær vørugjøldini og aðrar inntøkur sum hetta virksemið gevur, og tískil ágóðan av øllum inntøkunum, av tí, sum framleitt verður úti um landið.

Hesi vørugjøld hava givið Tórshavnar Havn umleið 30 mió. kr. í yvirskoti, sum er so at siga tað sama, sum ein javning millum kommunur hevði borið við sær.

Harafturat liggur eitt stórt Fiskimálaráð við eina ørgrynnu av arbeiðsplássum og fóðrar pengar til kommununa umvegis skattin. Væntandi hevði einki Fiskimálaráð verið, um eingin fiskaframleiðsla var.

**Alneyðugt fyri at fáa javnvág aftur**

Eg vil við hesum brævi vísa á, at tað er heilt burturvið, sum Heðin Mortensen, borgarstjóri í Havn og formaður í KSF, førir fram, tá ið hann sigur, at Havnin í einari javningarskipan kemur at gjalda skatt fyri útjaðaran.

Tvørturímóti er skipanin alneyðug fyri at fáa javnvág í samfelagið aftur, tí í dag fær Havnin bæði í posa og sekk.

Lat meg leggja afturat, at ein javningarskipan ikki einsamøll verður nóg mikið fyri at venda skeivu gongdini.

Neyðugt verður eisini hjá landsmyndugleikunum at leggja nakrar av almennu stovnunum úti um landið.

Samanborin við eina javning geva almenn arbeiðspláss so ótrúliga nógv meiri enn bara pengar.

Ikki bert Havnin, men allar Føroyar – tvs. eisini onnur øki enn Suðurstreymur – hava brúk fyri akademisku arbeiðsplássunum, tí slíkir persónar og familjur skapa nógv virðismikið í sínum nærumhvørvi, sum er so umráðandi fyri trivnað og menning.

Slík arbeiðspláss verða heldur ikki líka harðliga rakt av konjunkturbroytingum í fiskivinnuni og samfelagnum sum heild.